VB-Stjørnan 25-23 (12-11):

# Meistarar



*Eftir dystin skuldi gullið sjálvandi feirast, og sjálvandi var ein flúgvandi rundferð kring vøllin við á skránni*



*Aivaras Daugis verður av fleiri sagdur at vera størsta orsøkin til gullmerkið, og hetta tóktust leikararnir ikki hava gloymt*



*Nógv varð gjørt burturúr, til tess at dagurin skuldi verða so serligur, sum til bar*

**Tað varð staðfest seinasta mikukvøld, men sunnudagin kundu føroyameistararnir úr VB so halda FM-veitslu frammanfyri egnum áskoðarum**

FØROYAMEISTARAR
*orð: Jákup Mørk*
*myndir: Áki Bertholdsen*

Sunnudagin spældu hondbóltskvinnurnar úr Vági sín seinsta heimadyst á árinum, tá Stjørnan var á vitjan. Leingi var líkt til, at hetta skuldi verða dysturin, har gullmerkini endaliga skuldu tryggjast, men tá VÍF so snávaði móti Stjørnuni seinasta mikudag, var allur ivi burturbeindur, og ístaðin kundu bæði leikarar og áskoðarar gera seg út til gullveitslu, tá júst Stjørnan kom á vijtan.

Stjørnan hevði annars bronsumerkini hjá sær at stríðast fyri, men tað løgdu vágbingar líka í.

## Spenningur í

Og umframt sjálva gullveitsluna, so fingu vágbingar eisini ein spennandi hondbóltsdyst at síggja. Stjørnan stríddist nevnliga alla tíðina fyri sínum møguleika, og tó at VB fyri tað mesta var frammanfyri, so sleptu gestirnir ongan tíð endanum.

Tað gjørdist tó ikki meira enn næstan hjá gestunum. Heimakvinnurnar, sum til dagin vóru ílætnar serligum gullvestum, hildu alla tíðina fast, og tá Gurið Mortensen við fáum sekundum eftir skeyt mál til 25-22, var alt greitt. Stjørnan fekk skorað enn einaferð, men tað munaði lítið. VB er meistari, og vit lata annars myndirnar her á síðuni tala fyri seg.

## Dysturin í tølum

VB-Stjørnan 25-23 (12-11)

Málskjúttar:
VB: Daiva Toumaite 9, Reda Kurkauskiene 8, Gurið Mortensen 4, Laila Jespersen 2, Arnleyð Hjelm 1, Rannvá Augustinussen 1
Stjørnan: Danijela Ercevic 8(3), Natasha Stamenkovic 6(2), Jastrid Gullaksen 3, Bára S. Klakstein 3, Joan M. Joensen 2
Brotskøst: VB 1, Stjørnan 5
Útvísingar: VB 3, Stjørnan 5
Dómarar úr TB: Birgir Dimon & Kári Niclasen.



*Hóast gullið var avgjørt, so gjørdist talan um ein heilt spennandi dyst, har Stjørnan hekk í fram til tað allar seinasta*



*Føroyameistarar í kvinnuhondbólti 2003, VB*






TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Planleggingardeildin** er partur av byggi- og býarskipanardeildini í tekniska fyrisitingini.

Á deildini starvast 12 fólk.

Sum arkitektur á deildini verður tú ein partur av einari eind, ið arbeiðir við nógvum, stórum og áhugaverdum uppgávum og verkætlanum.

Planleggingardeildin er ein sera virkin deild, ið hevur nógv samskifti við ráðgevar og stovnar bæði innan- og uttanlands.

Virksemið og arbeiðsøkini á deildini gevur støðuga menning, og bjóðar kommunan tí góðar búningarmøguleikar og førleikamenning

www.torshavn.fo

## Arkitektur til planleggingardeildina

Tórshavnar kommuna søkir eftir starvsfólki til planleggingardeildina at byrja skjótast til ber. Viðkomandi skal vera útbúgvin arkitektur ella hava aðra viðkomandi útbúgving.

**Arbeiðsøkini á planleggingardeildini eru í høvuðsheitum:**
- útstykkingarætlanir
- byggisamtyktir og lokalplanir
- býarplanlegging
- sektorplanlegging
- verkætlanarskitsir og fylgja málum upp
- bygging av kommunalum bygningum
- luttaka í verkætlanum við eksternum ráðgevum
- samskifta við áhugabólkar, feløg, privatpersónar og stovnar

**Býráðið roknar við at umsøkjarin**
er útbúgvin arkitektur, ella hevur viðkomandi útbúgving, umframt at:
- hava royndir innan planlegging, projektering, eftirlit og umsiting.
- hava góðan kunnleika til EDV (Microsoft Windows, Word, Excel og Outlook, umframt Cad tekniprogram og/ella MicroStation).
- duga væl føroyskt, bæði í skrivt og talu.
- kunna arbeiða sjálvstøðugt og duga væl at leggja arbeiðið til rættis
- vera fyrikomandi og duga væl at arbeiða saman við starvsfólkunum á deildini.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálastýrið.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Mikael Viderø, leiðara ella Marius Müller, tekniska stjóra, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, 110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi týsdagin 22. apríl 2003 kl. 13:00. Viðmerk á brævbjálvan "arkitektur til planleggingardeildina".







## Sveisiarbeiði

Eg havi byrjað mína egnu fyritøku har alt sveisiarbeiði innan jarn, rustfrítt og alminium verður gjørt, bæði umvælingar og smærri arbeiði.

**Hevur hetta tín áhuga ring nátt sum dag.**
**Tlf. 422127/220957**
**LB Service**
v/ Lars Bisgaard

Kaj Andreasen & Co
Heilsøla • smásøla • umboð
Tel. 31 56 00 • www.andreasen.fo

## Útleiguamboð

**Skal tú brúka amboð í styttri tíð?**
**Hví eiga, tá ið tú kann leiga?**



**Til keyps og leigu:**
- Gravimaskinur
- Trumlur
- Lessimaskinur
- Arbeiðsskúrar
- Luft kompressarar og boriútgerð
- Stillads- og forskallingsútgerð
- Umframt mangt annað!

Sosialurin 311820

Sosialurin
www.sosialurin.fo